# Viðtøkur felagsins

## Navn og heimstaður

**§ 1**

1. Navn felagsins er, IKH Føroyar.

2. Heimstaður felagsins er tann kommuna, sum sitandi formaður hevur bústað í sambært Landsfólkayvirlitinum.
Bústaður formansins skal vera upplýstur á heimasíðu felagsins.

## Endamál felagsins

**§ 2**

1. Er at upplýsa og leiðbeina um Idiopatic Ketotic Hypoglycemia, stytt IKH.

2. At arbeiða fyri, at tey sum hava IKH, verður givin tann undirvísing, ið er neyðug hjá hesum bólki í samfelagi okkara

3. At veita upplýsing um viðgerðarmøguleikar.
Tá hetta kann arvast frá foreldrum til børn, er tað tí ógvuliga umráandi, at fólk koma at kenna til tær fylgjur, ið IKH hevur við sær.

4. At røkja felags áhugamál hjá teimun sum hava IKH og familjur teirra, við at veita stuðul og seta í verk tiltøk á økjum, sum almenna heilsuverkið ikki fevnir um.

5. At stuðla vísundaligari gransking av IKH, sum er nógv meiri útbreidd í Føroyum, enn úti í heimi, og tí krevst størri upplýsing, um viðgerð av IKH.

## Limir felagsins

**§ 3**

1. Ein og hvør, sum hevur goldið limagjald og sum tekur undir við endamáli felagsins, er limur í felagnum.

2. Limagjaldið verður ásett á vanliga ársaðalfundinum.

3. Ein limur, sum ikki virðir viðtøkur felagsins ella avgerðir, sum eru tiknar á ársaðalfundi, kann verða koyrdur úr felagnum av nevndini. Í slíkum føri skal ein eftirfylgjandi ársaðalfundur góðkenna slíka útblaking við meiriluta.

## Rakstur felagsins

**§ 4**

1. Rakstur felagsins verður fíggjaður við limagjaldi, tiltøkum og við fígging, ið fingin er til vega frá grunnum og einum og hvørjum, ið stuðlar endamáli felagsins.

## Ársaðalfundur

**§ 5**

1. Ársaðalfundur felagsins er hægsti myndugleiki felagsins.

**<u>Ársaðalfundur og skrá</u>**
**§ 6**
1. Ársaðalfundur verður hildin einaferð um árið, í seinasta lagi í apríl mánað. Boðað verður frá alment frá ársaðalfundi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn ársaðalfundin.

2. <u>Skráin fyri ársaðalfundin er hendan:</u>

*1.* Val av orðstýrara og skrivara

*2.* Nevndin greiðir frá um virki felagsins seinasta árið

*3.* Roknskapur til góðkenningar

*4.* Møgulig uppskot

*5.* Ásetan av limagjaldi

*6.* Val av 3 ella 5 nevndarlimum og minst 1 tiltakslimi

*7.* Val av grannskoðara

*8.* Ymiskt

Uppskot, sum skulu viðgerðast eftir punkt 4, skulu vera einum nevndarlimi í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn ársaðalfundur verður hildin.

**<u>Uppseting og skipan av nevndini</u>**
**§ 7**
1. Felagið verður stýrt av einari nevnd við antin 3 ella 5 limum, sum sita í 2 ár. Harafturat kunnu upp til 2 tiltakslimir verða valdir.

2. Helvtin av nevndarlimunum og helvtin av tiltakslimunum verða valdir av nýggjum á hvørjum ári, soleiðis at øll nevndin verður vald av nýggjum annaðhvørt ár. Nevndin skipar seg sjálva við formanni, kassameistara og skrivara. Formaður felagsins er andlit felagsins úteftir og talar felagsins vegna.

3. Nevndarfundur skal verða hildin í minsta lagi eina ferð um árið, og annars so ofta sum tørvur er á.

4. Nevndin skipar sína egnu dagsskrá og tekur tær avgerðir, ið eru neyðugar fyri rakstur felagsins.

5. Nevndin kann seta arbeiðsbólkar til at gjøgnumføra aktivitetir hjá felagnum. Slíkir arbeiðsbólkar vísa til nevndina og skulu fylgja teimum leiðreglum, ið nevndin hevur stungið út í korti.

6. Fundarfrásøgn verður send nevndini til góðkenningar innnan 14 dagar eftir nevndarfund ella aðalfund.

**<u>Eykaaðalfundur</u>**
**§ 8**
1. Nevndin kann innkallað til eykaaðalfund við 14 dagar freist.
2. Eykaaðalfundur kann verða hildin, tá ein triðingur av limunum skrivliga ella meirilutin av nevndini krevja tað. Tað skal samstundis tilskilast, hvat eykaaðalfundurin skal verða um

**Atkvøðurættur**
**§ 9**
Allar avgerðir, ið verða tiknar á ársaðalfundinum, verða avgjørdar við vanligum atkvøðumeiriluta. Einans limir, ið hava goldið limagjald hava atkvøðurætt. Limir hava eina atkvøðu í part.
**Broytingar av viðtøkum og upploysn felagsins**
**§ 10**
1. Broytingar í viðtøkum felagsins krevja, at meirilutin av limum felagsins á ársaðalfundi taka undir við broytingunum. Tað sama er galdandi, um felagið skal upploysast.

2. Verður samtykt at upploysa felagið, skal netto ogn felagsins verða latin til endamál, ið natúrliga hoyra saman við endamáli felagsins. Hetta verður avgjørt á upploysandi ársaðalfundinum

**Samsýning, keyp, søla o.a**
**§ 11**
Nevndarlimir fáa onga samsýning fyri nevndararbeiði. Felagið verður bundið við undirskrift frá tveimum nevndarlimum, harav tann eini skal vera formaðurin.
Tá ið talan er um keyp, pantsetan ella sølu av fastari ogn, krevst tó undirskrift frá allari nevndini.

**Heftan**
**§ 12**
Felagið heftir bara fyri sínar skuldarbindingar við ogn felagsins. Eingin limur ella nevndarlimur heftir persónliga fyri felagið.

**§ 13**
IKH-Føroyar er óheft av politiskum áhugamálum.
Nevndin kann í samband við einstøk tiltøk útvega sponsorar, og kunngera nøvn teirra.

**Roknskaparár**
**§ 14**
1. Roknskaparár felagsins er frá 1. januar til 31. desember.

2. Grannskoðan av roknskapi verður gjørd árliga eftir roknskaparárið er endað.

**Tulking**
**§ 16**
Eru ivamál um, hvussu hesar viðtøkur skulu skiljast, verða hesir spurningar avgjørdir á ársaðalfundi.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi í Kollafirði tann 11. Mars. 2021 og við broytingum á ársaðalfundi felagsing 6.juli 2023.